# Kjak



Bjarni Djurholm
*løgtingsmaður*

# Bøtir salt alt?

*Saltsiloin er ikki bert eina gávu. Hon kann gerast dýr og blíva ein kleppur fyri suðuroyingar*

Um dagarnar eru tvinni uppskot løgd fyri tingið at játta íløgu- og rakstrarpening til Saltsiloina á Tvøroyari. Samlaður íløgukostnaður um 60 mio kr, umframt mvg-frítøkuna, sum landið missur.

Projektið virkar tølandi. Talan er bert um triðingsupphædd tí danir koma við restini. Men er tað so?

Verkætlanin gjørdist avleggari av einum eftirskúla í Hvalba, har ósamsvar var millum nyttu og kostnað. So var at finna uppá okkurt annað.

Stigtakarin barslaði nýtt uppskot. Saltsiloin skuldi gerast mentanardepil í Norðurhøvum, ein tón- og sjónleikaoasa, fjarskotin frá fólkameingi, eitt uppland til arketoniskt forvitni og alment fitilendi hjá mentanarkveikjara.

Í sjálvdrátti hevur fyrrverandi sambandshøvdingin nú lagt uppskot fyri tingið, har skotið verður upp, at landið beinanvegin játtar 20 mio kr, umframt 2,5 mio kr í árligum rakstrarstuðli. Sama hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum gjørt, tó við virknaði frá 2012. Eingin íløguraðfesting. Alt gjørt í politiskum ad hoc gávumildni og ovfarakæti.

Men spurningurin er, hvussu kann slíkt projekt realiserast uttan veruliga politiska viðgerð?

### Lobbyarbeiði

Søgan byrjaði fyri ári síðani við óglærum lobbyarbeiði sum endaði við tilsøgnum ella politiskum knæfalli, sum so er brúkt at fáa Mærsk og donsku stjórnina at játta 38 mio til projekt, sum flestu bert kenna konjunkturarnar av. So einfalt kann peningur fáast til vega, tó at fleiri aðrar verkætlanir í landinum hava staðið í bíðirøð í áravís.

Annað, sum tykist ørkymlandi er ætlanin, at landið árliga skal rinda helvtina av rakstrarkostnaðinum fyri virksemi, sum aðrastaðni verður goldið lokalt. Tí er almenna gjaldsjáttanin prinsipiell, tí hví skulu onnur mentanarhús og bygdarhús ikki fáa almennan stuðul til sítt gerandisvirksemi? Hví skulu Atlantis, Mentanarhúsið í Fuglafirði, Bygdarhúsið á Strondum o.s.fr ikki vænta somu vælvild?

Í áravís hevur tað verið afturvendandi ynski, at landið játtar pening til rakstur av mentanartilboðum. Men her hevur politikkurin verið avgjørdur, skilnaður er gjørdur millum fíggjarlóg og lokalt mentanarvirksemi. Men nú er so vend ávegis, skilst. Har ein skriða er lopin er onnur væntandi, tí hví skulu onnur ikki vænta sær somu rakstrarvælvild sum Saltsiloin?

Annað er so, at Saltsiloin skjótt kann gerast ein fíggjarligur kleppur fyri lokalsamfelagið. Aðrastaðni í landinum standa mentanarhús mestsum tóm, tí fíggjarorka ikki er til gerandisvirksemi. Har eru stórt sæð ongar inntøkur, bert útreiðslur. Hví skal tað so verða øðrvísi á Tvøroyri, har kommunan eisini liggur fíggjarligum andaleypi, at hon neyvan klárar gerandisskyldurnar.

### Annað at bjóða

Hinvegin, so er hevur Suðuroyggin so ómetaliga nógv annað at bjóða, har peningur uttanífrá og landskassaískoyti veruliga kundi gjørt mun fyri mentanina og ikki minst ferðavinnuna. Og møguleikarnir eru nógvir, har eitt hjálpandi íløguískoyti kundi gjørt allan munin.

Í Vági liggja handilshúsini úti á Marknoyri og vesturi á Gørðunum. Har hevði ein ítøkilig verkætlan og ístandseting við eini bøtandi hond og peningainnsprænging mestur komið væl við.

Handils- og fiskahúsið við træbrúnni á Hvítanesi og framúr havnarumhvørvið á Tvøroyri, sum av eldsálum er sett í stand og gjørt til fólkaogn, er ein perla, har avmarkað almenn upphædd helst hevði gagnað meiri enn risa upphædd á Drelnesi. Í Fámjin stendur fitti handilin og kaffein og bíðar eftir einari hjálpandi hond. Í Hovi royna fús fólk at gera gamla handilin við bátahylin til eitt savn. Sjáldsama grótlaðingin á Fiskieiðinum, kolanámini í Hvalba – ja, ivaleyst eru fleiri slíkir møguleikar í Suðuroy. Allastaðni hevði stór nytta verið í íløgustuðli, sum annars ikki er til taks.

### Minni fyri meira?

Sjálvsagt kunnu øll fegnast um stórfingnu peningaváttanina úr Danmark. Men spurningurin er, fáa vit minni fyri meira? Ein risa íløga í eitt so ógvisligt hús sum Saltsiloin á Drelnesi er eitt. Nakað heilt annað verður stríðið av at fylla Saltsiloina við nógvum og dyggum innihaldi, áskoðara- og áhoyraraundirtøku, sum kann bera árliga kostnaðin av rakstri og viðlíkahaldi til at rættvísgera hetta altjóða átakið fyri byrjaðanarprísi uppá 60 milliónir krónur?

Rætt er, at fittur partur av íløgukostnaðinum kemur úr Danmark. Slíkt duga summi fólk (eru tey nevnd, so eru tey kend) ikki at siga nei takk til. Men hava vit ráð til hetta eksperiment vitandi um, at íløgan bara er partur av fíggjarliga veruleikanum, sum fer at daga í havsbrúnni?

Tá vit ikki í ártíggju hava klárað Tjóðleikpallin og Kirkjubømúrin betur enn higartil, so er hugsandi, at hvaðna verri kann tað gerast við Saltsiloini á Tvøroyri. Livst so spyrst.

MTHøjgaard
We know how
J&K PETERSEN
EIÐI 2 Suður KONSORTIET

**Eiði 2 Suður er í gongd við at bora uml. 8,4 km vatntunnil, eisini skulu gerast 27 luft- og vatnskaktir.**

Vit søkja í hesum sambandi eftir einum elektrikara, sum kann luttaka í uppgávuni, og sum kann verða við á boriholdinum.
Tað verður borað í 2-hold skift, við einum holdi á frívakt.

Løn sambært sáttmála + møguleika fyri boribonus.

**Eiði 2 Suður Konsortiet**
Torben Voetmann Johansen
tjo@mthojgaard.dk
Fartlf. 21 63 40

EIÐI 2 Suður KONSORTIET
Hoydalsvegur 42
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 316342

**Leygardagin 12. mars kl. 17 (e)**

Í sendingini verður nýggi Hyundai ix20 royndarkoyrdur saman við Birgiri Dam Jacobsen frá bilasøluni Nordbil.

Eisini verða tvær samrøður endursendar. Onnur er við Mogens Wraae koyrilærara og busseigara. Mogens er dani, sum hevur búð í Føroyum síðan 1956. Hin samrøðan er við Henning Sørensen frá HS Møblum á Hjalla.

*** Sendingin verður eisini endursend sunnudagin 13. mars kl. 17**




Vinnu- & bilradio á Rás 2